# Páskir – størsta hendingin í mannasøguni

"Eingin hending sum nakrantíð hevur verið, kann síðustillast við hendingina, sum fór fram á Golgata. Tað, at menniskja hevur sett sín fót á mánan, ella aðrar stórhendingar blikna afturímóti hesum, at Jesus - sonur hins livandi Guds - gav Seg sjálvan, at doyggja fyri meg, ja fyri alla mannaættina, fyri at eg og øll, sum trúgva, skulu arva ævigt lív".



*- Fyri meg er páskaboðskapurin so lívgevandi; tað handlar ikki um ein deyðan Jesus, men um ein upprisnan Jesus, sigur Tummas Jacobsen, samkomuleiðari í Filadelfia*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

PÁSKABOÐSKAPUR
*Tummas Jacobsen*

Páskirnar eru ivaleyst ein tann størsta høgtíðin beint eftir jól.

Tíbetur eru føroyingar tilvitaðir um at halda hesa høgtíðir, og tað munnu vera fáir føroyingar, í mótsetning til aðrar tjóðir, sum ikki vita hvat hesar høgtíðir snúgva seg um.

Í okkara kristnu mentan eru hæddarpunktini í kristniboðskapinum tá Jesus varð føddur til jarðar av Mariu moy, og táið Jesus endaði Sítt jarðarlív, við at ofra seg sum syndoffur fyri alla mannaættina, fyri síðani at verða reistur upp frá deyðum.

Persónliga upplivi eg páskaboðskapin so gleðisfyltan, at eg kann ikki lata vera við at tilbiðja Jesus sum Harra og meistara. Tað er tann størsta hendingin sum nakrantíð er farin fram í heimsøgu manna.

Eingin hending sum nakrantíð hevur verið, kann síðustillast við hendingina, sum fór fram á Golgata. Tað, at menniskja hevur sett sín fót á mánan, ella aðrar stórhendingar blikna afturímóti hesum, at Jesus - sonur hins livandi Guds - gav Seg sjálvan, at doyggja fyri meg, ja fyri alla mannaættina, fyri at eg og øll, sum trúgva, skulu arva ævigt lív.

### Fráboðað 500 ár frammanundan

Eg havi mangan undrast á hesa hending serliga um hvussu umfatandi hon var.

Profeturin Jesaia sigur frá hesi hending, longu eini 500 ár frammanundan, og hann sigur m.a.:

"Men Hann varð særdur fyri brot okkara, soraður fyri misgerðir okkara; straffin varð løgd á Hann, so vit skuldu hava frið, og við sárum Hansara eru vit grødd."

Profeturin greiðir frá, at øll synd mannaættarinnar varð løgd á Hann. Hetta merkir, at syndin hjá teimum, sum høvdu livað áðrenn Jesus var borðin í heim, varð løgd á Hann; syndin hjá øllum menniskjum, sum komu at liva eftir Hansara jarðarlív, ja heilt fram til okkara tíð, varð løgd á Hann.

Øll synd, sum eg nakrantíð havið gjørt og sum eg nakrantíð farið at gera, er løgd á Hann. Øll syndin sum Hitler gjørdi móti mannaættini, var løgd á Hann. Øll órættvísi sum Saddam Hussein hevur gjørt móti sínum landsmonnum, varð løgd á Hann, og alt sum Bush hevur og fer at gera skeivt var lagt á Hann. Og vit kunnu halda áfram.

Í royndini og veru merkir hetta, at við Jesu deyða á Golgata, og við Hansara uppreisn er øll mannaættin frelst. Eftir stendir bert hjá okkum at taka ímóti hesi frelsu, og tí prædikar Paulus, at hvør tann, sum við hjartanum trýr at Jesus er sonur Guds, og við munninum játtar Jesus sum Harra, skal verða frelstur.

### Lívgevandi boðskapur

Tað er áhugavert at hugsa um, at sjálvt Ábraham, Nóa, Móses og aðrir ikki náddu inn í Paradís - í nærveru Guds - fyrr enn við deyða Jesusar.

Jesus er tað ofrið sum mátti til, fyri at menniskja kundi koma nær Gudi, og tessvegna bíðaðu hinar mongu sálirnar í deyðaríki eftir "loysnaranum", sum koma at loysa tey úr deyðaríki og heim til Guds stað.

Tað er hetta plássið Jesus tosar um, tá Hann greiðir frá ríka manni og Lazarus. Djúpt festi var millum hesar báðar; ríki maður píndist svárliga, meðan Lazarus var í fangi Ábrahams, men við deyða Jesusar stendur skrivað, at mong av teimum, sum sovnað vóru (vóru deyð) vístu seg í Jerusalem; hesi vóru tey, sum vóru loyst úr deyðaríki, og vóru á veg heim í Paradís.

Fyri meg er páskaboðskapurin so lívgevandi; tað handlar ikki um ein deyðan Jesus, men um ein upprisnan Jesus, og við trúnni á Hann veit eg at eg eigi ævigt lív.

Hetta merkir at eg skal liva við Honum í allar ævir. Ofta verður tosað um "deyðans myrka dal", men eg eri sannførdur um, at vegna Jesus skal eg ikki í nakran deyðans myrka dal, men eg skal flyta úr hesum lívi inn í teir himmalsku bústaðir, ella v.ø.o. eg fari úr einum lívi yvir í eitt annað, har alt er fullkomið.

Jú, tað er øll orsøk til at hátíðarhalda hesa høgtíð, og tað er sanniliga ein gleðishøgtíð fyri hvønn tann, sum trýr á Jesus. Men tað kann so ikki dyljast burtur, at fyri tann, sum ikki trýr, er hetta boðskapur, sum kunngerð dóm, tí Jesus sigur at tann, ið ikki trýr er longu dømdur. Men fyri hvønn tann, sum trýr, hevur Jesus borið dómin okkara vegna.

Eg vil ynskja mínum landsmonnum bæði á sjógvi og landi einar gleðiligar páskir, við bøn um at alt okkara fólk skal liva í trúgv á Hann, sum vit minnast hesar páskadagar.

# Páskir – uppreisn ella feria?

Vit hava tosað við tveir 16 ára gamlir dreingir úr Havn um, hvønn týdning páskini hava fyri teir. Hugsanin um um páskini er rættiliga ymisk – annar fer á møti, og hin heldur frí.

PÁSKIR
*Annika Isfeldt og*
*Guðrun Jacobsen*

– Páskini er ein stór høgtíð og hon er týdningarmikil at minnast á, sigur Hugo Joensen.

– Vit í Frelsunarherinum hava trý páskamøti, og nú á páskum fara vit suður til Vágs at hava møti. Páskini eru ein sera hugnalig høgtíð, tí tað er eitt gott høvi at vera saman við familju og vinum, og tað er altíð hugnaligt at vera her í Frelsunarherinum.

Men ikki minst hava páskini stóran týdning fyri meg, tí tað var jú tá, at Jesus reis upp.




*– Eg lesi nógv í Bíbliuni um páskirnar, sigur 16 ára gamli Hugo Joensen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Eg lesi nógv í Bíbliuni um hesa tíðina, tó fari eg ikki í kirkju, tí eg fari nokk bara á møti her á páskum.

Páskadag er eisini ein heilt serligur dagur her í Frelsunarherinum, tí her eta vit morgunmat saman, hava sjálvandi møti og hornorkestrið hjá okkum spælir fyri sjúklingunum á Landssjúkrahúsinum, endar Hugo.

### Vanligir dagar

– Páskini eru sum vanligir dagar fyri meg, einasti munurin er, at ein onnur skrá er í sjónvarpinum, sigur Geir Johansen.

– Eg fari ikki í kirkju á páskum og geri faktist ikki tað stóra. Eg sovi leingi um morgunin, hugni mær saman við vinunum, fari nokk í býin á páskum og eg njóti bara at hava frí.

Eg veit væl, hví man heldur páskir, men eg eri bara glaður fyri at hava feriu.